Nr. 6/2019

Jóhan Eli Poulsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um tunnilsvegin til Hvalbiartunnilin, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvør er orsøkin til, at vegurin til nýggja Hvalbiartunnilin Hvalbiarmegin verður gjørdur við fleiri smáum svingum, heldur enn einum svingi?

2. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hví vegurin er lagdur har, tekningarnar hjá Landsverki leggja upp til?

3. Um støðið verður tikið í tekningunum hjá Landsverki, ætlar landsstýrismaðurin at gera nakað við tað?

Viðmerkingar:
Vegurin til Hvalbiartunnilin verður bygdur í løtuni. Tað hevur elvt til stóra undran fyri fólk í Hvalba, at vegurin Hvalbiarmegin er farin væl oman um gamla uppdyrkingarvegin, ið liggur har. Fólk hava fingið tekningar frá Landsverki, ið vísa, at vegurin fær eitt keðiligt "s" skap. Hetta elvir til mikla ørkymlan hjá bygdarfólkunum. Tað vildi verið upplagt, um vegurin varð gjørdur við einum beinum strekki og bleytum svingi. Vegurin verður væl at merkja partur av Suðuroyartunlinum, tá ið hann kemur. Hugsa vit um ferðslutrygd og framtíðarferðslu gjøgnum Hvalbiartunnilin og á tilhoyrandi vegum kann hugsast, at tað hevði verið skilabetri at lagt vegin soleiðis, at hann varð so beinur sum gjørligt, við so fáum svingum sum tilber.

Á Løgtingi, 10. oktober 2019

Jóhan Eli Poulsen